## Háskúlar eftirskúlar

Í ár hava so nógvir grønlendskir ungdómar søkt um at sleppa á eftirskúla, at verandi eftirskúlar megna ikki at hýsa øllum. Á eftirskúlunum er pláss fyri 80 næmingum, men umleið 320 søktu. Tí hava teir báðir háskúlarnir gjørt av at taka eftirskúlanæmingar inn í ár. Landsstýrið hevur játtað góðar 22 milliónir krónur eyka, og tað røkkur til 254 næmingar, sigur KNR. Umframt tey 320, sum søktu um at sleppa á eftirskúla í Grønlandi, hava 400 grønlendskir ungdómar fingð¨pláss á eftirskúlum í Danmark.



## Umhvørvisbýir

Í Noregi hevur Erik Solheim, umhvørvismálaráðharri, skotið upp, at býir, sum gera okkurt eyka fyri at avmarka útlátið av veðurlagsgassum og fyri at bøta um býarumhvørvið yvirhøvur, skulu fáa viðurkenning fyri tað. Í tí sambandi hevur ráðharrin havt fund við 12 býir, teirra millum Oslo, Bergen, Stavanger, Trondheim og Tromsø, og ætlanin er, at býirnir skulu binda seg til at fremja ávís tiltøk. Millum annað er ætlanin at skerja ferðsluna inni í býunum og at minka nýtsluna fyri at avmarka burturkastið.

# Vinarbýur vitjar vinarbý



*Nidarósdomen í Trondheimi, sum er vinarbýur við Klaksvík*

**Kommunalstjórin í mentamálum í Trondheim kommunu, Gerhard Dalen, vitjar í hesum døgum í Klaksvík, sum er vinarbýur hjá Trondheimi. Umframt sítt borgarliga starv í býnum, er Dalen leiðari av symfoniorkestrinum í býnum. Eisini er hann kendur fyriletrarhaldari í Noregi. Hóskvøldið og fríggjakvøldið heldur norðmaðurin tveir fyrilestrar í Klaksvík**

VITJAN
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*
*Myndir: Dávur Winther*

Í sambandi við 100 ára haldið hjá Klaksvíkar kommunu, fær Klaksvík áhugaverda vitjan í hesum døgum. Hesuferð úr norska býnum Trondheim, sum millum annað ger nógv burtur úr at prýða kommunalar bygningar og tað almenna býrúmið við listaverkum.

Tað er mentunnarligi kommunalstjórin, Gerhard Dalen, sum vitjar Klaksvík, ið er vinarbýur við Trondheim.

Umframt at vera kommunustjóri er Gerhard Dalen leiðari av symfoniokestrinum í Trondheimi og eisini kendur fyrilestrarhaldari í heimlandinum.

Fyrri fyrilesturin hjá norðmanninum, sum verður í býráðshøllini í Klaksvík í annaðkvøld klokkan 19.30, hevur heitið »Listarlig prýðing av almenna rúminum« við undirheitinum »Er hetta ein óneyðug kommunal byrða - ella er tað við til at menna býin?

Trondheim kommuna hevur hesar málsetingar viðvíkjandi list:

1,25 prosent av íløgukarminum skal fara til listarilig prýði av kommunalum bygningum og almenna býrúminum. Listarfólk verða tikin upp á ráð í tilgongdum at velja støð til prýðis, hvat listarligt skal verða lagt eftir – hetta í samráð við arkitektar ogbýarplanleggjarar. Ætlanir eru t.d. um at prýða St. Ólavs Sjúkrahús fyri 100 mió. Krónur. Býrurin vil vera heimsins største uttandura savn fyri nútíðar list. Á fyrilesturin verður kunnað í orðum og myndum um skipanir, og hvussu langt komið er áleiðis.

Í sambandi við fyrilesturin, sum varar ein tíma, fara Åsbjørg Ryeng at spæla á bandodion, sum er ein argentinsk harmonika, meðan Lars Magnus Steinum spælir violin.

### Eisini í Christianskirkjuni

Fríggjakvøldið klokkan 19.30 heldur Gerhard Dalen fyrilestur í Christianskirkjuni um undir heitinum »Pílagrímsleiðin til Nidarós«

Við pílagrímsvegin til Santiago de Compostella í Spania stendur eitt vegskelti, har boða verður frá: Santiago de Compostella 222 km, Roma 2475 km, Jerusalem 5000 km og Trondheim 5000 km.

Trondheim og Trøndelag er miðdepilin í Ólavs-siðunum í Noregi. Hetta er týdningarmikið stað, tá ið um arvin eftir Ólavur Halga ræður.

Ein landsumfatandi verkætkan er farin av bakkastokki, har ætlanin er at seta Nidarós, Trondheim og Stiklastaðir í miðdepilin fyri pílagrímsferðum. Stóra og stásiliga dómkirkjan í Trondheimi verður á dagliga máli kallað Nidarosdommen.

Frá 1994 til 1997 bleiv pílagrímsvegurin millum Oslo og Nidaros endurskapaður. Eisini eru pílagrímsvegir gjørdir til og frá Svøríki.

Endamálið er sambinda pílagrímsarbeiðið tættari móti Santiago de Compostella í Spaniu og Vadstena í Svøríki.

Fyrilesturin í Noreg kunnar um eina størri satsing av pílagríms virksemi í framtíðini í norðurlondum eisini.

Líka sum fyrilesturin í býráðshøllini fer fyrilesturin í Christianskirkjuni eisini at vara á leið ein tíma.



*Gerhard Dalen, sum er mentunnarligur kommunalstjóri í Trondheim kommunu, heldur hóskvøldið fyrilestur í býráðshøllini í Klaksvík um listarliga prýðing av almenna rúminum. Fríggjakvøldið er hann at hoyra í Christianskirkjuni*